# Heildarætlan fyri Kjarnuna

2024-2029

TAKS

**Toll- og skattaskipanin hjá TAKS skal nútímansgerast**

Her siga vit í stuttum, hví hon skal tað,
hvussu tað skal gerast, og hvat tað kostar.

Nú søgdu vit Toll- og skattaskipanin og kundu tað sama
sagt Elektronskipanin ella 3270, tí tað eitur hon eisini.

Á hesum síðum siga vit Toll- og skattaskipanin, og um
skipanirnar, sum hon inniheldur, siga vit fakskipanir.

Einaferð, um ikki so leingi, fer alt at eita Kjarnan.

TAKS, januar 2024

Eyðun Mørkøre
stjóri

# Innihald

**1. TÍ SKAL TOLL- OG SKATTASKIPANIN HJÁ TAKS NÚTÍMANSGERAST ........ 4**

**2. MÁLSGONGDIN ........ 5**

**3. AVBJÓÐINGIN ........ 8**

3.1. VANSIN VIÐ TÍ GÓÐA GAMLA ........ 8
3.2. EITT STIG FRAM ÍMÓTI TÍ NÝGGJA – OG EITT AFTUR ........ 9

**4. GJØGNUMBROTIÐ ........ 9**

**5. HEILDARÆTLANIN ........ 9**

5.1. VISIÓNIN FYRI HEILDARÆTLANINI ........ 10
5.2. ALT TAÐ, SUM HEILDARÆTLANIN INNIHELDUR ........ 10

**6. MENNINGIN ........ 12**

6.1. MENNINGARLEIÐ 1 ........ 12
6.2. MENNINGARLEIÐ 2 ........ 13
6.3. MENNINGARLEIÐ 3 ........ 13
6.4. MENNINGARLEIÐ 4 ........ 14

**7. BYGNAÐURIN ........ 15**

7.2. VERKÆTLANARLEIÐSLA Á MENNINGARLEIÐUM ........ 17

**8. KOSTNAÐURIN ........ 19**

8.1. FÍGGJARÆTLAN ........ 20

# 1. Tí skal Toll- og skattaskipanin hjá TAKS nútímansgerast

TAKS hevur boðað Fíggjarmálaráðnum frá, at Toll- og skattaskipanin hjá stovninum skal nútímansgerast, og at tað er bráðneyðugt at fara undir arbeiðið.

Tí skipanin kann skjótt steðga upp.

Í fyrra lagi, tí at tey, sum kenna grundarsteinarnar í skipanini, eru farin at fækkast. Nøkur eru farin frá fyri aldur, summi fara skjótt, og onnur eru ikki millum okkara meira.

Í seinna lagi, tí at skipanin brúkar so gamla tøkni, at dagsins KT-fólk kenna hana ikki. Tað er tí vorðið ringt at røkja skipanina, og longu um 5-6 ár kann skipanin steðga upp.

Støðan er við at gerast álvarsom, tí at meginparturin av inntøkunum hjá landi og kommunum verður kravdur inn við skipanini. Tí hevur TAKS boðað Fíggjarmálaráðnum frá, at bráðneyðugt er at fara undir arbeiðið.

Gjørd er heildarætlan, ið sigur, at tað ganga seks ár at nútímansgera Toll- og skattaskipanina. Byrjast skal í 2024, og liðugt er í 2029. Kritiskar mugu gerast fyrst, til dømis persónskatturin.

Nútímansgerðin fevnir um 35 stórar og smáar verkætlanir og er mett at kosta 150 mió. kr. í alt.

## 2. Málsgongdin

TAKS og Elektron skaptu Toll- og skattaskipanina og hava síðan startin hin 1. apríl 1984 verið við til at røkja og víðarimenna hana. Í 2011 og 2012 útgreinaðu stovnarnir, hvussu bøtast kundi um skipanina. Tað var ikki arbeitt leingi, til funnið varð útav, at sum tað fyrsta mátti hon flytast yvir á ein nýggjan windows-plattform. Migrerast, sum tey siga. Tvær orsøkir vóru til tað:

- Peningastovnarnir, sum høvdu verið saman við TAKS um gamla plattformin, høvdu avgjørt at flyta skipanir sínar til Danmarkar. TAKS skuldi tí einsamalt bera kostnaðin av at reka plattformin, og rakstrarútreiðslur stovnsins fóru tí at økjast.
- Plattformurin, sum higartil hevði verið brúktur, var gamal, og Elektron kundi ikki veita vissu fyri, at hann ikki fór at steðga upp. Gjørdi hann tað, fór tað at fáa stórar avleiðingar fyri rakstrartrygdina av Toll- og skattaskipanini.

Í 2012 fekst avtala og játtan at flyta skipanina yvir á nýggjan windows-plattform. Verkið varð liðugt í 2018 og hepnaðist sera væl og í tøkum tíma, má sigast. Tí stutt eftir steðgaði gamli plattformurin upp, og lív fekst ikki í hann aftur.

Síðan hevur TAKS hvørt ár boðað frá, at Toll- og skattaskipanin skal nútímansgerast. Í tekstinum til fíggjarlógina 2023 stendur:

> *"Síðan 1980-áríni eru KT-kjarnuskipanirnar hjá TAKS støðugt útbygdar, riknar og viðlíkahildnar av hesi játtan. Skipanirnar fevna í dag um fakskipanir til skatt, toll og avgjøld v.m., undir hesum eisini býtið millum land og kommunur. Hetta merkir, at skipanirnar hjá TAKS hava sera avgerandi týdning fyri landið, tí tær tryggja innkrevjing og eftirlit við meginpart-inum av inntøkum landskassans. Arbeitt hevur verið í fleiri ár við at uppstiga KT-skipanirnar til nútímans pall, soleiðis at raksturin gerst bíligari. Uppstigingin varð liðug á heysti 2018. Hóast uppstigingina eru KT-skipanirnar tó framvegis gamlar og krevja at verða nútímansgjørdar."*

Í 2019 fóru TAKS og Elektron at kanna, hvør nýggj tøkni skuldi brúkast til at nútímansgera skipanina, og við ársslok 2020 var komið til eina niðurstøðu. Fyri at tryggja, at hon var røtt, varð óheftur ráðgevi biðin um at meta um hana. Hetta var fyrst í 2021, og í mars hetta árið varð so endaliga avgjørt, at arbeiðast skuldi fram ímóti:

- einum servicegrundaðum arkitekturi,
- einum API-grundaðum dátuútvekslingslagi,
- einum low code-menningaramboði til at menna brúkaramótið (OutSystems).

Eftir avgerðina var klárt at fara undir at fyrireika heildarætlanina fyri nútímansgerðina.

Myndin niðanfyri vísir arkitekturin í nútímansgjørdu skipanini. Tað sæst, hvussu hon er uppbygd sum ein lagkøka. Hevur ein lagdeildan arkitektur, sum tað eitur.

Niðast eru dátugrunnarnir. Har stórar broytingar verða gjørdar við skipanini aðramáta, verða dátugrunnarnir fyri tað mesta óbroyttir.

Næstniðast er maskinrúmið – forrætningslogikkurin, á fakmáli – har upplýsingar úr dátugrunninum verða viðgjørdar og uppsettar soleiðis, sum ásett er, at tær skulu verða uppsettar.

Uppsettar, verða upplýsingarnar sendar til næsta lag – dátuútvekslingslagið – haðani tær fara út á skermarnar hjá brúkarunum og so aftur sama veg. Soleiðis samskifta skipanin og brúkarin.

Niðastu løgini verða nútímansgjørd av Elektron. Tað krevur nágreiniligan kunnleika um skipanina at arbeiða við hesum løgum, og ta vitanina er tað bert Elektron, sum hevur.

Arbeiðið við at gera ovastu løgini, t.e. skermmyndir og annað, hevur verið í útboði, og Formula fekk uppgávuna. Ment verður í OutSystems. Tað er skipan, sum Talgildu Føroyar eisini brúka, og sum gevur samstarvsfyrimunir.




*Mynd: Arkitekturin í nútímansgjørdu skipanini.*

Yvirlit yvir málsgongdina:

**2010** Elektron boðar frá, at okkurt má gerast við Toll- og skattaskipana, tí hon fer ikki at kunna koyra leingi afturat.

**2011** Greining av tørvi og kostnaði. Niðurstøðan var, at migrering skuldi gerast fyrst.

**2013** Játtan til at migrera Toll- og skattaskipanina samtykt, og verkætlanin sett í gongd.

**2018** Migreringin liðug í november og hepnast væl. Stutt eftir steðgar gamli plattformurin upp.

**2019** TAKS fer undir arkitekturverkætlan í sambandi við nútímansgerð av Toll- og skattaskipanini, men lítil orka er á stovninum til slíka ætlan, so tað gongur seint. Korona rakar eisini.

**2020** TAKS metir, at bíðast kann ikki longur við nútíðargerðini og fer til verka, hóast fígging ikki er útvegað.

**2021** Í januar verður óheftur ráðgevi biðin um at koma við tilmælum um skipanararkitektur og val av menningaramboði til brúkaramót.

**2021** Í juni byrjar uppseting av nýggjum menningar- og rakstrarplattformum (OutSystems, service-infrastrukturi, Docker og Kubernetes).

**2021** Verkætlanarleiðari settur í starv og útboð gjørt til at manna eitt menningartoymi.

**2021** Í september er kick-off til menning av fyrsta parti av skipanini.

**2022** Verkætlanin gongur eftir ætlan, men steðgar við ársenda, tí fígging vantar. Tó er neyðugt at gera tillagingar í mun til nýggju virkisskránna hjá Talgildu Føroyum.

**2023** Nærum øll KT-játtanin hjá TAKS verður brúkt til at fyrireika íbinding í nýggju virkisskránna hjá Talgildu Føroyum. Hetta verður gjørt í nýggju tøknini.

# 3. Avbjóðingin

Arbeiðssetningurin hjá TAKS er at tryggja samfelagnum inntøkur, umsita veitingar og at verja samfelagið ímóti ólógligum innflutningi. Hetta gerst best við KT og ofta bert við KT.

Líka síðan KT kom til Føroya, hevur TAKS verið millum teirra, ið hava gingið á odda at brúka tøknina í arbeiði sínum, og tað var frambrot við lít, tá ið Toll- og skattaskipanin kom í 1984. Væl frágingin og við einari av snildastu skattaskipanunum í heiminum læt hon upp ein nýggjan dag fyri TAKS.

Javnt og samt hava TAKS og og Elektron útbygt skipanina, so at hon í dag inniheldur eina røð av fakskipanum, sum TAKS brúkar til at umsita virksemi sítt.




*Mynd: Toll- og skattaskipanin og einstøku fakskipanirnar í henni*

## 3.1. Vansin við tí góða gamla

Toll- og skattaskipanin hevur roynst væl, men dansar ikki í takt við nútíðina, og avbjóðingarnar standa í kø.

Ein avbjóðing er, at skipanin hevur eitt tekngrundað brúkaramót, sum komandi skrivstovufólk illa kennast við, tí tey eru von við dagsins grafisku brúkaramót. Tað skapar eina verri støðu hjá TAKS í kappingini um starvfólkini.

Ein onnur avbjóðing er, at verandi skipan stuðlar ikki upp undir nýmótans arbeiðshættir, eitt nú brúkaravinarligari tænastur og effektivari eftirlit, og tað er henda vegin, ið TAKS ynskir at fara.

Ein triðja avbjóðing er, at fólkini, sum skaptu skipanina, og sum duga at viðlíkahalda hana, eru farin at eldast, og tað skaffast ikki nýtt fólk, sum kann tað sama, tí nútíðin er farin við teimum. Hvørja

ferð, eitt lyklapersónur gevst í starvi, missa bæði TAKS og Elektron virðismikla vitan, og gamla skipanin kemur eitt fet nærri eggini.

| | | | |
|---|---|---|---|
| == Inntøkur == | | == Frádráttur í skatti == | |
| Fyribilsskr. A-innt.: | 0 | Persónsfrádráttur...: | 0 |
| Fyribilsskr. B-innt.: | 200.000 | Barnafrádrátt.(land): | 0 |
| A-inntøka til í dag.: | 996.973 | Barnafrádrátt.(komm): | 0 |
| == Frádráttir == | | Rentufrádrátt.......: | 0 |
| Frádráttur í A-innt.: | 0 | Frádrátt. frá hjúnaf: | 0 |
| Frádráttur í inntøku: | 65.800 | Reg. í frádrátti....: | 0 |
| Samlaðar rentur.....: | 0 | Frádráttur tilsamans: | 0 |
| Egnar rentur........: | 0 | == Skattir == | |
| Uttanlandsskattur...: | 0 | Askatt til í dag....: | 438.208 |
| | | Grein-75 útgjald....: | 0 |
| Kommunuprosent......: | 20,75 | Útskr. B-skattur....: | 78.000 |
| Kirkjuprosent.......: | 0,60 | Nýásettur B-skattur.: | 78.000 |
| Skattsk.innt. 27.12.: | 1.131.100 | Goldin A-trygging...: | 0 |
| Væntað A-inntøka....: | 996.973 | Goldið barsilsgjald.: | 0 |
| Útrokningarslag.....: | A | | |

*Mynd: Brúkaramót í verandi Toll- og skattaskipan.*

## 3.2. Eitt stig fram ímóti tí nýggja – og eitt aftur

TAKS metti í 2020, at hóast eingin serstøk fígging var fingin, so mátti farast undir at nútímansgera Toll- og skattaskipanina, tí støðan var álvarsom. Aðrar KT-verkætlanir vórðu niðurraðfestar, og so varð farið í gongd. Tað vísti seg tó skjótt, at hetta var ov stór verkætlan at fíggja í vanligu játtanini hjá TAKS, og at tað fór at taka longri tíð, enn bíðast kundi. Eftir at gjørt var eitt stórt grundleggjandi arbeiði til at velja best hóskandi tøkni og arbeiðshátt, steðgaði verkætlanin tískil aftur ultimo 2022.

# 4. Gjøgnumbrotið

Eftir leingi at hava gjørt vart við ta álvarsligu støðu, sum samfelagið kann koma í, um Toll- og skattaskipanin gongur fyri, og at TAKS megnar ikki at fíggja eina nýggja skipan einsamalt, eydnaðist loksins at vinna ljóð og at fáa nútímansgerðina av Toll- og skattaskipaini á fíggjarlógina.

# 5. Heildarætlanin

Vakin um tað verandi – Opin fyri tí ótonkta. Við hesum orðum í skjøldri hevur TAKS nú við nýggju møguleikunum lagt eina heildarætlan fyri, hvussu Toll- og skattaskipanina skal nútímansgerast.

Vakin um tað verandi, tí vit eru tilvitað um, at verandi skipanir hava dygdir, ið vit skulu taka við okkum. Opin fyri tí ótonkta, tí vit eru forvitin um teir møguleikar, sum kunnu liggja í nýggja.

## 5.1. Visiónin fyri heildarætlanini

Visiónin fyri heildarætlanini leggur dent á at skapa nýmótans KT-amboð, sum kunnu vera við til at skapa eitt skynsamari og effektivari TAKS. Visiónin er at:

> *"Framtíðartryggja Toll- og skattaskipanina og skapa tíðarhóskandi arbeiðsamboð, ið stuðla upp undir skynsaman rakstur og eftirlit, føroyska samfelagnum til frama."*

Visiónin fyri heildarætlanina er nágreinað soleiðis innanhýsis á TAKS:

> *"Endamálið við heildarætlanini fyri Kjarnuna er fyrst og fremst at nútímansgera og framtíðartryggja Toll- og skattaskipanina. Tað merkir í høvuðsheitum, at øll brúkaramót verða gjørd av nýggjum, og at svørtu skermmyndirnar frá 80'unum verða avloystar av tíðarhósk-andi skermmyndum.*
>
> *Í hesi tilgongdini verða eisini arbeiðshættir endurskoðaðir og hugsaðir av nýggjum, og málið er, at hetta skal geva eina munandi effektivisering.*
>
> *Verkætlanin tekur støði í okkara missión, visión, virðum og yvirskipaðu strategi, og fremjanin og úrslitið av hesi verkætlan skulu stimbra okkara stoltleika. Í verkætlanini mugu vit vísa virkisfýsni og dirvi at hugsa nýggjar tankar, soleiðis at vit flyta stovnin munandi við nútíðar-bærum arbeiðsamboðum.*
>
> *Verkætlanin fer at skapa møguleikar og viðføra jaligar tillagingar á TAKS. Arbeiðsorka verður helst frígivin á summum økjum og flutt yvir á onnur øki, og frígivin arbeiðsorka onkrastaðni kann merkja uppraðfestingar aðrastaðni. Eitt ættarliðsskifti stendur fyri framman, og verkætlanin fer at stimbra undir, at hetta ættarliðsskiftið verður væleydnað.*
>
> *Somuleiðis skal KT-undirstøðukervið nútímansgerast."*

Hugsanin við heildarætlanini kann lutast sundur í trý høvuðsmál:

- at framtíðartryggja skipanirnar við at nútímansgera undirliggjandi tøkni og plattform,
- at fremja fleksibla útveksling og endurnýtslu av dátum,
- at nútímansgera brúkaramótið og passa tað til nútíðar virkisgongdir.

## 5.2. Alt tað, sum heildarætlanin inniheldur

- Útskifting av tøkniliga pallinum til nýmótans tøkni.
- Nútímansgerð av teimum 35 størri og smærri fakskipanunum, har nágreinast skulu gott 60 eftirlitslistar og 900 skermmyndir fyri at tryggja, at allir funktiónir eru við.
- Nýggj standardloysn til at handfara hendingarlistar til at stuðla undir skynsamt eftirlit.
- Nýggjar standardloysnir, sum knýta Kjarnuna og journalskipanina saman til at stuðla undir smidliga málsviðgerð.

- Nýggjar standardloysnir til at stuðla undir eftirlitsarbeiðið.
- Nýggj brúkarastýring grundað á Active Directory.
- Nýggj standardloysn til skjalagoymslu.
- Nýggj standardloysn til kladdu.
- Integratión til virkisskránna, FOLK, BSL og aðrar samstarvspartnarar.

Sum nevnt hevur TAKS longu gjørt ávegis arbeiði, sum tikið kann vera við í heildarætlanina. Eitt nú eru fleiri arkitekturverkætlanir longu fullførdar. OutSystems-plattformurin er bygdur, ein service-baseraður arkitekturur er skaptur, API-infrastruktur er lagdur, ein produktiónsplattformur er gjørdur og ein QA/test-plattformur er uppsettur. Hesar verkætlanir hava allar hepnast væl.

# 6. Menningin

Fyri at nútímansgera Toll- og skattaskipanina er ætlanin at fremja 35 verkætlanir. Hesar 35 verkætlanir verða býttar í fýra parallellar menningarleiðir, sum síðan verða raðfestar av leiðsluni á TAKS út frá eini meting av, hvat skapar mest virði fyri stovn og samfelag. Út frá hesi yvirskipaðu ætlan verða verkætlanirnar á hvørjari menningarleið raðfestar í eini agilari tilgongd. Raðfestingarnar verða gjørdar út frá, hvørjar verkætlanir eru mest átrokandi í mun til ta avgerandi vitan, sum skjótt ikki verður tøk, við tað at fólk, sum hava vitanina, fara frá fyri aldur í næstum.

## 6.1. Menningarleið 1

Høvuðsfokus í menningarleið 1 eru tær skipanir, sum verða brúktar til at umsita, útrokna og avgreiða skatt fyri borgarar, herundir skattabókhald, kommunubýti og eftirløn. Menningarleiðin snýr seg í stóran mun um at effektivisera umsitingina av borgaraupplýsingum, herundir umsiting av skattskyldu, frádráttum, undantøkum og annars øðrum skyldum, sum borgarar hava yvir fyri TAKS.

Skattaskipanin er eftirhondini rættiliga kompleks, og gjøgnum árini er hon spakuliga broytt í samsvari við tær lógarbroytingar, sum samtyktar eru, síðan skipanin varð sett í verk í 1984. Skipanin er í stóran mun bygd á nakrar neyvt útvaldar skipanarkoyringar, sum eru við til at halda TAKS og samfelagnum í eini rættiliga læstari arbeiðsgongd við skatti og øðrum. Skipanin varð upprunaliga bygd soleiðis, at skatturin av einum vanligum lønarútgjaldi (a-inntøku) leypandi kundi skundavroknast í inniverandi ári. Hetta var og er framvegis ein av snildastu skattaskipanunum í heiminum. Menningarleiðin snýr seg tí um at nútímansgera a-skattaskipanina, hóast hon skal virka júst, sum hon ger í dag.

Persónsskatturin er í stóran mun sjálvvirkandi, soleiðis at borgarar kunnu rætta og upplýsa inntøku sína í sjálvgreiðslum, har skatturin so verður roknaður og innkravdur stórt sæð sjálvvirkandi. Menningarleið 1 skal kanna, hvussu avgreiðslan av skatti hjá borgarum kann sjálvvirkjast og effektiviserast enn meira. Ein avleiðing av, at skattaavrokningin alt meira verður gjørd við sjálvgreiðslum, er, at tørvur er á at menna amboð til TAKS at gera skynsamari eftirlit. Menningarleið 1 fer tí eisini at kanna møguleikarnar fyri hesum.




*Mynd: Yvirlit yvir menningarleið 1*

## 6.2. Menningarleið 2

Í fyrstu syftu skal menningarleið 2 gera verkætlanina viðvíkjandi umsiting av virkjum lidna, soleiðis at henda verkætlan kann vera klár, tá nýggja virkisskráin verður tikin í nýtslu í 2024. Eftir hetta verður fokusið hjá hesi menningarleiðini at skapa nakrar felagsloysnir, ið skulu brúkast í teimum ymsu fakskipanarverkætlanunum. Tá hesir grundleggjandi partarnir eru komnir upp á pláss, er ætlanin at arbeiða við útrokning og avgreiðslu av virkisskatti, herundir ársroknskapi o.ø.

Frá 2025 fer menningarleið 2 at arbeiða við nútímansgerð av innflutningsskipanini. Ætlanin er við nýggjum amboðum at effektivisera arbeiðsgongdina enn meira í sambandi við tollavgreiðslu, so at TAKS eisini framyvir kann hava eina skjóta avgreiðslu av vaksandi innflutninginum, uttan tó at fara upp á kompromis við eftirlitsuppgávu síni.

Avrokning av tolli av innflutningi verður í stóran mun avgreidd sjálvvirkandi gjøgnum sjálvgreiðslur til virkir, Posta og speditørar. Nakrir manglar eru, og hugt verður tí at, hvussu tað síðsta eisini kann gerast sjálvvirkið. Harafturat fer menningarleið 2 at arbeiða við at skapa nýggjar loysnir til innflutningseftirlitið til at stuðla upp undir, at avmarkaða arbeiðsorkan, sum TAKS hevur til tolleftirlit, verður brúkt sum skynsamast.

Menningarleið 2 heldur fram í 2027 við at nútímansgera kapitalvinningsskatt, vinningsbýtisskatt og avgjøld, herundir mvg. Menningarleið 2 endar í 2029 við at nútímansgera toll- og vøruskránna.




*Mynd: Yvirlit yvir menningarleið 2*

## 6.3. Menningarleið 3

Menningarleið 3 fer í 2024 og 2025 at menna eina nýggja skipan til Barsilsgrunnin. Skipanin verður ikki fíggjað av heildarætlanini. Sum partur av barsilsverkætlanini arbeiðir menningarleið 3 harafturat við nøkrum felagsloysnum, sum hava týdning fyri barsilsumsitingina. Tað merkir, at menningarleið 3 byrjar ikki undir heildarætlanini fyrr enn í 2026.

Menningarleið 3 heldur fram í 2026 við at nútímansgera stuðlar, sum TAKS umsitur. Tað snýr seg fyrst og fremst um frítíðarløn og rentustuðul. Í sambandi við rentustuðul fer menningarleið 3 at kanna møguleikan fyri at gera tilgongdina til útgjaldið av rentustuðli fult sjálvvirkandi.

TAKS umsitur fleiri grunnar fyri landið. Tískil endar menningarleið 3 við at kanna, hvussu umsitingin av Trygdargrunninum, Vinnusjúkugrunninum og AM-grunninum kunnu nútímansgerast. Arbeiðið at nútímansgera hesar grunnar er tó treytað av, at grunnarnir sjálvir kunnu fíggja arbeiðið. Hetta arbeiðið er ikki partur av fíggingini av heildarætlanini.




*Mynd: Yvirlit yvir menningarleið 3*

## 6.4. Menningarleið 4

Menningarleið 4 fer at fokusera upp á bókhaldspartin av Toll- og skattaskipanini. Fyri at fáa samsvar í bókhaldspartin er tørvur á eini víðfevndari nútímansgerð, so at TAKS eftir nútímansgerðina bara hevur eina bókhaldsskipan til at stýra skuld og áogn hjá borgarum og virkjum til TAKS og aðrar almennar stovnar, sum TAKS krevur inn og rindar út fyri, eitt nú KvF, Heilsutrygd, Almannaverkið, Barsilsgrunnin, AMEG o.s.fr. Menningarleið 4 fer eisini at nútímansgera virkisgongdir og skipanir til innheinting fyri borgarar og virkir.

Bókhaldið hjá TAKS er tætt knýtt at landsbókhaldinum, BSL. Tí verður neyðugt at gjøgnumganga allar sambindingar og modell fyri avhending av upplýsingum til BSL í samstarvi við Gjaldstovuna, soleiðis at tryggjað verður, at BSL altíð fær rættar upplýsingar á sama hátt sum í dag. Í hesum sambandi verður møguligt at kanna eftir, um útveksling av dátum frá bókhaldsskipanini hjá TAKS til BSL kann nútímansgerast, herundir um Heldin møguliga kann brúkast sum undirstøðukervi. Tó skal sigast, at hetta er nakað, sum báðir partar mugu vera samdir um. Hin møguleikin er, at dáturnar, sum skulu flytast til BSL, verða fluttar á sama hátt sum í dag.




*Mynd: Yvirlit yvir menningarleið 4*

# 7. Bygnaðurin

Arbeiðið við heildarætlanini fyri Kjarnuna verður grundfest í leiðsluni á TAKS, tí talan er um nútímansgerð av innanhýsisskipanum hjá stovninum.

Heildarætlanin fyri Kjarnuna verður skipað soleiðis:




### 7.1.1. Eigarabólkur

Yvirskipaður eigari í verkætlanini er landsstýrisfólkið í fíggjarmálum. Skipaður verður tí ein eigarabólkur við landsstýrisfólkinum í fíggjarmálum á odda. Landsstýrisfólkið velur samstundis hini umboðini í bólkinum.

Endamálið við bólkinum er at tryggja, at eigaran av verkætlanini kann fylgja við, um verkætlanin fylgir teirri menningarætlan, tíðarætlan og fíggjarætlan, sum avtalað er frá byrjan.

Verkætlanin er mett at kosta 100 mió. kr., og hesin bólkurin fer eisini yvirskipað at stýra fíggingini, sum kann forskjótast nakað yvir fíggjarár. Eigarabólkurin játtar eisini nýtslu av teimum 50 mió. kr., sum settar eru av til tøkniligar og fíggjarligar óvissur.

### 7.1.2. Stýrisbólkur

Stýrisbólkurin er mannaður av leiðslubólkinum á TAKS, við stjóra stovnsins sum eigara av heildarætlanini. Stýrisbólkurin tekur allar strategiskar avgerðir og tryggjar, at heildarætlanin fylgir yvirskipaðu strategiini hjá TAKS. Tað er m.a. ábyrgdin hjá stýrisbólkinum at tryggja fyriskipanarligu og búskaparligu karmarnar fyri, at heildarætlanin kann fremjast.

Stýrisbólkurin skal greiða frá visiónini í heildarætlanini og skal tryggja grundfestið í stovninum. Stýrisbólkurin skal eisini hava ábyrgd av at tryggja, at ágóðarnir við Kjarnuni verða framdir í verki.

Stýrisbólkurin skal harumframt gera raðfestingar í heildarætlanini fyri Kjarnuna út frá eini meting av, hvat skapar størst virði fyri TAKS.

### 7.1.3. Fylgibólkur hjá TAKS

Við nútímansgerðini av Toll- og skattaskipanini kemur eisini ein gyltur møguleiki at hugsa arbeiðsgongdir av nýggjum. Verandi skipan er frá fyrst í 80'unum og er síðan leypandi útbygd. Tað er sera sannlíkt, at arbeiðshátturin fyri 40 árum síðan var heilt øðrvísi enn í dag, og avmarkaðu møguleikarnir í skipanini hava hildið fast í hesum gomlu arbeiðsgongdum. Tí fer TAKS at leggja stóran dent á at hugsa arbeiðsgongdir av nýggjum, samstundis sum heildarætlanin verður framd.

TAKS hevur í hesum sambandi arbeitt miðvíst við hugburðinum til nýskapan, og í slagorðinum "Vakin um tað verandi – Opin fyri tí ótonkta" skal øll nýhugsan taka sítt útgangsstøði.

Hetta fer at merkja, at nógv orka hjá TAKS skal brúkast til nýhugsan. Hesin bólkurin skal stuðla undir og tryggja nýskapan og effektivisering upp á tvørs. Bólkurin hevur ein ráðgevandi leiklut til kjarnuleiðsluna, tó at avgerðir verða tiknar í stýrisbólkinum.

Stjórin hevur ábyrgdina av bólkinum, sum hevur breiða luttøku av ambassadørum á TAKS. Verður neyðugt við fólki uttanifrá til at stuðla undir hesa tilgongd, so verður hetta fíggjað av TAKS uttan fyri sjálva heildarætlanina.

### 7.1.4. Lógarbroytingar

Í tilgongdini verður ivaleyst komið framá, at skilabest er at gera onkrar lógarbroytingar fyri at fáa sum mest burtur úr nýskapanarpartinum av verkætlanini. Knýttur at heildarætlanini verður tí bólkur at arbeiða við hesum. Stjórin er formaður, og bólkurin er annars mannaður við leiðara og starvsfólkum á lógardeildini. Talan kann vera um praktiskar broytingar í atknýttum lógum, so sum tíðarfreistir, renturokningar og líknandi.

### 7.1.5. Fíggjarligt eftirlit

Á TAKS verður serstøk funktión upprættað til at hava ítøkiligt eftirlit við, um verkætlanin heldur fíggjarætlanina, sum er stungin út í kortið. Henda funktión verður partur av roknskapardeildini á

TAKS, sum vísir beinleiðis til stjóran. Fíggjarstøða í mun til verkætlan verður fast punkt á skrá á fundum í stýrisbólkinum og í eigarabólkinum.

### 7.1.6. Kjarnuleiðsla

KT-menningarleiðarin hjá TAKS fær ábyrgd av heildarætlanini og vísir til eigara og stýrisbólk. Í kjarnuleiðsluni vera eisini ein KT-arkitektur og ein test- og releasesamskipari. Í bólkinum vera eisini verkætlanarleiðararnir á ymsu menningarleiðunum.

Kjarnuleiðslan hevur ábyrgd av, at úrslit síggjast innan fyri avtalaðar búskaparkarmar, at úrslitini hava avtalaðu dygdina, og at tíðarfreistir verða hildnar. Búskaparkarmarnir eru fastir, men heildarætlanin verður framd út frá einum agilum hugsanarhátti. Fokus verður tí á at skapa størst møguligt virði innan fyri ásettu búskaparkarmar og tíðarrammu.

Kjarnuleiðslan hevur dagliga raksturin av heildarætlanini og tryggjar eina hóskandi framdrift. Kjarnuleiðslan skal tryggja rætta fokusið fyri at náa ynsktu úrslitum og úrtøku.

### 7.1.7. Menningarleiðir

Í heildarætlanini eru 35 verkætlanir, sum verða framdar via fýra parallellar menningarleiðir.

## 7.2. Verkætlanarleiðsla á menningarleiðum

Skipanin við verkætlanum á teimum fýra menningarleiðunum fylgir bygnaðinum, sum lýstur er niðanfyri. Hvør menningarleið fremur nakrar menningarverkætlanir. Hvørja ferð, ið farið verður undir nýggja verkætlan, verður skipanin av henni endurskoðað og luttakarar til hennara valdir.

Tær fýra menningarleiðirnar verða skipaðar soleiðis:




### 7.2.1. Stýrisbólkur fyri verkætlan

Stýrisbólkurin í heildarætlanini fyri Kjarnuna tilnevnir verkætlanareigara úr leiðslubólkinum hjá TAKS og ger av, hvørjir aðrir luttakarar skulu í bólkin.

### 7.2.2. Verkætlanarleiðslan

Í verkætlanarleiðsluni er ein verkætlanarleiðari, sum vísir til verkætlanareigaran og stýrisbólkin.

Verkætlanarleiðarin hevur ábyrgd av at tryggja, at verkætlanin avhendar ynskta virðið innan fyri fíggjarligu karmarnar, rammurnar fyri arbeiðsorku og tíðarfreistirnar, ið stýrisbólkurin hevur ásett.

Verkætlanarleiðarin hevur ábyrgd av at avhenda og raðfesta ynski og krøv, ið leiðsla og starvsfólk hava til ítøkiligu verkætlanina út frá meginregluni um fyrst at avhenda tað, ið skapar størst virði.

Verkætlanarleiðarin skal harumframt tryggja ynsktu framdriftina hjá einstøku verkætlanini. Verkætlanarleiðarin kann eftir tørvi nýta arbeiðsorku úr kjarnuleiðsluni. Verkætlanaleiðarin er partur av kjarnuleiðsluni.

### 7.2.3. Menningartoymi

Hvør menningarleið hevur sítt menningartoymi. Í menningartoyminum er vanliga ein scrum-master og fýra mennarar. Um neyðugt, kunnu fleiri mennarar setast til ávísa verkætlan, um ynski er at avhenda skjótari. Menningartoymið kann eisini nýta virksemisráðgevar internt á TAKS og eftir tørvi ráðgevar hjá Elektron.

Menningartoymi arbeiða agilt eftir scrum-arbeiðsháttinum í sprintum, so at sjónlig virðisøkjandi úrslit koma brúkarunum til góðar so leypandi. Hesin arbeiðsháttur verður nýttur til at tryggja, at brúkararnir verða tiknir við og fáa høvi til leypandi at royna og rætta tað, sum kemur burturúr.

### 7.2.4. Brúkarabólkur

Til hvørja verkætlan verður knýttur ein brúkarabólkur við starvsfólkum, ið brúka skulu loysnina. Leikluturin hjá brúkarabólkinum er saman við verkætlanarleiðaranum at lýsa tørvir og koma við ynskjum og krøvum til loysnina í verkætlanini. Brúkarabólkurin ummælir og góðkennir eisini ta ella tær skipanir, sum menningartoymið avhendar, áðrenn tær verða endaliga verksettar.

# 8. Kostnaðurin

Niðanfyri sæst kostnaðurin fyri tær 35 verkætlanirnar í Kjarnuni, og nær tær ætlandi verða lidnar. Barsil og AM standa í reyðum, tí teir fíggja sjálvir nútímansgerðina av viðkomandi skipanum sínum.

| # | Verkætlanir | Meting (toymisdagar) | Meting (kr.) | Væntandi liðugur |
|---|---|---|---|---|
| | **Menningarleið 1** | **1091** | **31.228.784** | |
| 1.1 | Borgaraumsiting | 115 | 3.291.760 | 2024 |
| 1.2 | Inntøkur og ogn | 52 | 1.488.448 | 2024 |
| 1.3 | Innheinting, úttanhýsis | 141 | 4.035.984 | 2025 |
| 1.4 | Persónsskattur | 288 | 8.243.712 | 2026 |
| 1.5 | Persónsskattur, bókhald | 157 | 4.493.968 | 2027 |
| 1.6 | Kommunubýtið | 63 | 1.803.312 | 2027 |
| 1.7 | Eftirløn | 94 | 2.690.656 | 2028 |
| 1.8 | Eftirlønaravrokning | 31 | 887.344 | 2028 |
| 1.9 | Markaeftirlit | 150 | 4.293.600 | 2029 |
| | **Menningarleið 2** | **1212** | **34.692.288** | |
| 2.0 | Heildarmynd - Virki | 37 | 1.059.088 | 2024 |
| 2.1 | Virkisumsiting | 60 | 1.717.440 | 2024 |
| 2.2 | Feilstýrisskipan, errorhandling | 10 | 286.240 | 2024 |
| 2.3 | Hendingarloggur | 20 | 572.480 | 2024 |
| 2.4 | Standard skipan til hendingar | 20 | 572.480 | 2024 |
| 2.5 | Standard skipan til skjalagoymslu | 20 | 572.480 | 2024 |
| 2.6 | Virkisskattur | 94 | 2.690.656 | 2025 |
| 2.7 | Virkisskattur, bókhald | 31 | 887.344 | 2025 |
| 2.8 | Innflutningur | 110 | 3.148.640 | 2025 |
| 2.9 | Flutningur | 120 | 3.434.880 | 2026 |
| 2.10 | Famur | 115 | 3.291.760 | 2027 |
| 2.11 | Kapitalvinningsskattur | 58 | 1.660.192 | 2027 |
| 2.12 | Vinningsbýti | 52 | 1.488.448 | 2027 |
| 2.13 | Avgjøld | 73 | 2.089.552 | 2027 |
| 2.14 | Útflutningur | 183 | 5.238.192 | 2028 |
| 2.15 | Toll- og vøruskrá | 209 | 5.982.416 | 2029 |
| | **Menningarleið 3** | **420** | **12.022.080** | |
| **3.1** | **Barsilsgrunnurin** | 390 | 11.163.360 | **2025** |
| 3.2 | Standardkladda, skipan | 20 | 572.480 | 2024 |
| 3.3 | Standard integratión til 360 | 20 | 572.480 | 2024 |
| 3.4 | Standard fyrispurningarskipan | 40 | 1.144.960 | 2025 |
| 3.5 | Rentistuðil | 167 | 4.780.208 | 2026 |
| 3.6 | Frítíðarløn | 73 | 2.089.552 | 2027 |
| 3.7 | Brukaraumsiting BG og VG | 100 | 2.862.400 | 2027 |
| **3.8** | **AM grunnurin** | 125 | 3.578.000 | **2028** |
| | **Menningarleið 4** | **507** | **14.512.368** | |
| 4.1 | Debitorbókhald | 225 | 6.440.400 | 2026 |
| 4.2 | Útgjald | 52 | 1.488.448 | 2026 |
| 4.3 | Gjaldstovubókhald | 31 | 887.344 | 2026 |
| 4.4 | Innheinting | 199 | 5.696.176 | 2027 |
| | Íalt | **3230** | **92.455.520** | |
| | Starvsfólk | | **7.200.000** | |
| | **Samlaður Kostnaður** | | **99.655.520** | |

## 8.1. Fíggjarætlan

Sambært meting hjá TAKS fer heildarætlaninin fyri Kjarnuna at kosta 100 mió. kr. í nútíðarprísi (2022). Fyri at taka hædd fyri príshækkingum, óvissum og óvæntaðum meirkostnaði, eigur ein meirkostnaður á 50% at verða lagdur oman á samlaðu kostnaðarmetingina.

Fíggjarliga sær heildarætlanin fyri Kjarnuna 2024-2029 tí soleiðis út:

